# Søgan kemur heimaftur

TÍÐINDASKRIV

Tann 15. desember 2001 hevði Nevndin fyri danska-føroyska Savnssamstarvinum seinasta fund sín, og skrivaði nevndin tá undir tilráðing sína til danska mentamálaráðharran um, hvørji føroysk mentanarvirði kunnu skiljast frá søvnunum hjá Nationalmuseet og flytast til Føroya Fornminnissavn. Tilráðingin varð latin Nationalmuseet og haðani send mentamálaráðharranum tann 19. desember. Ráðharrin hevur nú í skrivi til Nationalmuseet góðkent, at teir savnsgripir, sum nevndin hevur rátt til, verða latnir Føroya Fornminnissavni.

Nevndin varð sett, og arbeiðssetningur hennara givin av landsstýrismanninum við mentamálum og danska mentamálaráðharranum í felag í samsvari við Samstarvsavtalu millum Føroya Fornminnissavn og Nationalmuseet, undirritað tann 10. juni 1999 av landsantikvarinum og danska ríkisantikvarinum og góðkend sama dag av landsstýrismanninum við mentamálum og danska mentamálaráðharranum.

Tilráðingin fevnir um savnsgripir, sum gjøgnum tíðirnar eru sendir til Oldnordisk Museum, Nationalmuseets 2. Afdeling, Den Kongelige Mønt- og Medaillesamling, Dansk Folkemuseum og Frilandsmuseet.

Sum grundarlag fyri tilráðing síni hevur nevndin mett um, hvar hvør einstakur savnslutur kundi hugsast at hava størst virði sum heimildartilfar fyri gransking og upplýsing. Gripir, sum mugu haldast at hava stóran týdning í føroyskari søgu, eisini persónssøgu, verða latnir Føroya Fornminnissavni og somuleiðis gripir, sum Føroya Fornminnissavn framman undan ikki hevði makan til.

Har fleiri gripir saman eru at meta sum ein heild, hevur nevndin roynt at hildið teir saman á øðrum av søvnunum.

Savningarsøgan hevur havt stóran týdning fyri tilráðing nevndarinnar. Soleiðis hevur nevndin ikki hildið tað verið rætt at taka aftur gávur, sum Fríðrikkur krúnprinsur, seinni Fr. VII kongur, fekk undir vitjan síni í Føroyum í 1844, eins og teir savnslutir, sum savnaðir vórðu í 1959-61 í samstarvi við Føroya Fornminnissavn, verða verandi í Múlahúsunum á Frilandsmuseet, sum teir vóru ætlaðir til.

Savnslutir, sum hava alstóran savnssøguligan týdning fyri Nationalmuseet, verða verandi har. Nevndin hevur roynt at býta søvnini soleiðis, at tað framvegis vera søvn á Nationalmuseet, sum á fullgóðan hátt kunnu lýsa okkara mentan.




Á aðalfundi 5. apríl verður lagt fram uppskot um at skipa Føroya Sparikassa sum partafelag.

Tekna teg sum ábyrgdara í Føroya Sparikassa innan 5. apríl 2002. So fært tú møguleikan at gerast partaeigari í Føroya Sparikassa P/F.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

# Semja um savnsrøktina

Miðað verður ímóti at finna eina loysn viðvíkjandi savnsrøktini at koma í gildi komandi skúlaár

Føroya Lærarafelag boðar í tíðindaskrivi frá, at semja er gjørd við Mentamálastýrið um at fara undir tingingar saman við Kommunusamskipan Føroya og Fíggjarmálastýrinum um at fáa skipaði viðurskifti á savnsrøktini í fólkaskúlanum.

Í semjuni, sum er undirskrivað 2. apríl 2002, stendur m.a., at miðað verður ímóti at finna eina loysn viðvíkjandi savnsrøktini at koma í gildi skúlaárið 2002/2003.

Í semjuni stendur eisini, at miðað verður eftir, at tingingarnar skulu vera lidnar og semja fingin í lag fyri 15. mai 2002.

Uppgávunevndirnar fáa tær skrivligu próvtøkuuppgávurnar til eftirkanningar, áðrenn tær fara til prentingar.

Í einum fylgiskjali hevur Føroya Lærarafelag boðað frá, at nevnd felagsins, eftir drúgva viðgerð og fyri at koma víðari í málinum enn einaferð hevur víst sín góða vilja at loysa savnsrøktarmálið, hevur samtykt at fara undir tingingar við landsmyndugleikar og Kommunusamskipan Føroya. Tíverri vil Føroya Kommunufelag ikki vera við, og tað heldur Føroya Lærarafelag er spell.

Føroya Lærarafelag hevur gjørt greitt í fylgiskrivinum, at um tingingarnar ikki eru lidnar og semja fingin í lag fyri 15. mai 2002, verður støðan eins og fyri hesa avtalu.

Við hesum boðar Føroya Lærarafelag frá, at loyvt verður limum felagsins aftur at gera próvtøkutilfar til skrivligu fráfaringarroyndirnar og víðkaðu fráfaringarroyndirnar og at vera próvdómarar til skrivligu fráfaringarroyndirnar.

Tó skal Føroya Lærarafelag gera vart við, at limir felagsins framvegis ikki røkja serstovur og amboð. Henda støða er galdandi til limir felagsins fáa løn fyri røkt av søvnum.




Bilar
Nr. 63 • hósdagur • 4. apríl 2002 • 76. árg.

# Aircondition skeið – fyrsta av sínum slagi í Føroyum

**Í døgunum 19. til 21. mars var skeið fyri bilsmekanikarar í viðlíkahaldi av air-condition í bilum, á bildeildini á Tekniska Skúla í Havn. Hetta var fyrsta skeið av sínum slagi í Føroyum. Airconditionskipanir skulu til eftirlit við jøvnum millumbilum**

AIRCONDITION
*Magnus Gunnarsson*

Seinnu árini er tað blivi alt meira vanligt at nýggir bilar koma við aircondition. Hetta hevur ført við sær at bildeildin á Tekniska Skúla í Havn hevur skipað fyri skeiði fyri bilmekanikarar í viðlíkahaldi av hesum skipanum. Luttakararnir, ið vóru 9 í tali, fingu bæði ástøðiliga og verkliga frálæru, ið endaði við eini roynd, ið gevur eina KMO (Kølebranchens Miljø Ordning) góðkenning, og harvið kunnu teir arbeiða við køliskipanum við fylling upp til 1000 gram.

### Heilsutrupulleikar

Hesir 9 luttakararnir fingu serfikat uppá at kunna viðlíkahalda og geva ta røttu tænastuna, sum er í samsvar við treytirnar ið bilframleiðarin áleggur, og at tað verður rætt atborið við við t.d. burturbeining av CFC gassum, og at arbeiðið verður gjørt sambært galdandi umhvørvisreglum. Skeiðleiðari var Jørgen Ingvardsen frá Christronik Aps, ið eru serfrøðingar innan tænastuamboð, undirvísing og ráðgeving í køliteknikki. Christronik, ið framleiða amboðini á teirra egnu verksmiðju í Danmark, hava tætt samstarv við eitt nú Scania í Svøríki. Um aircondition skipanin lekur kann tað ávirka heilsuna hjá bilføraranum, soleiðis at hann fær høvuðpínu, búkilsku, og trupult við at anda. Tí skulu aircondition skipanir eftirhyggjast við jøvnum millumbilum.



*Luttakararnir á airconditionskeiðinum. Aftara rað frá vinstru: Bob Patti og Jakku Guttesen frá Bilasøluni v/Øssur Johannesen, Jørgen Ingvardsen skeiðleiðari, Jan Dam Vang frá P/f Esmar Simonsen, Tummas Rasmussen og Vagnur Skúvadal frá P/f Meinhardt Arge, Jóan Dávid Trondesen frá Tekniska Skúla. Fremra rað: Sámal Petur Mittelstein frá Norðbil, Heri Guttesen frá Reyni Service og Johan Volles frá Sp/f VR Bilar*

# Jubileumsbilar frá Volvo

**Tann 14. apríl í ár eru liðin 75 ár síðan fyrsti seriuframleiddi Volvo bilurin koyrdi út av verksmiðjuni í Hisingen norðan fyri Gøteborg. Í hesum sambandi hava VR Bilar nøkur sera góð jubileumstilboð, har til ber at keypa ein Volvo persónbil við "Jubilee Pack 75" fyri einans 7.500 krónur eyka**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Framleiðslan av Volvo ÖV4, byrjaði 14. apríl 1927. Fyrstu bilarnir komu til Danmarkar í 1930. Útflutningurin av Volvo bilum byrjaði av álvara eftir kríggið við PV444. Í 1956 kom Volvo Amazon, ið bleiv ein sera væl umtóktur og haldgóður bilur. Volvo 144, ið seinni blivu til 240 røðina, komu á marknaðin í 1966. Síðan komu 340 og 360, og teir størru 740 og 760 og 800 og 900 røðirnar.



*Volvo S60 við leðurintrekki og ECC - automatiskum klimaanleggi. Nakkapúturnar aftan kunnu leggjast automatiskt niður*



*Her er Eyðun Lisberg, sølumaður hjá VR Bilum, við einum Volvo S40 við "Jubilee Pack 75"*

### "Jubilee Pack 75"

Í sambandi við 75 ára hátíðarhaldið hava Volvo nøkur sera góð tilboð, har Volvo S40 og V40 eins og S60, V70 og S80 fáast við einum jubileumspakka sum teir nevna "Jubilee Pack 75". Til S/V40 umfatar tilboðið valmøguleikar ímillum stoff og stoff/leður inntrekk, ECC - automatiskt klimaanlegg, leðurrætt, fart pilot, informatiónsdisplay og originalar 16" sportsfelgur. Til S60,V70 og S80 er útgerðin m.a. leðurinntrekk, bakkspegl ið blendar automatiskt niður, nakkapúturnar aftan kunnu leggjast automatiskt niður og ECC - automatiskt klimaanlegg. Henda útgerð, ið eftir røttum skuldi kostað umleið 35.000 krónur, fæst sum "Jubilee Pack" fyri einans 7.500 krónur eyka.